

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 12 - 2012

# Gass kann bjarga grikkum

Í einari roynd at finna pengar til at loysa landsins ovurstóru kreppu eru grikkar farnir undir umfatandi seismiskar kanningar sunnan fyri ta kendu frítíðaroynna Kreta. Tað skrivar grikska blaðið Kathimerini, sum eisini veit at siga, at kanningarnar verða lidnar næsta summar. Tað er ikki av tilvild, at grikkar eru farnir at leita eftir gassi júst sunnan fyri Kreta. Serfrøðingar vilja vera við, at gass er undir havbotninum har, og ein meting hjá Deutche Bank sigur, at talan kann vera um gass fyri einar 425 milliardir evrur ella einar 3.000 milliardir krónur. Metingin hjá tí týska banaknum sigur eisini, at um alt gongst væl, kunnu pengarnir fara at rulla niður í grikska ríkiskassan um átta ár. Flokkurin PASOK, sum er við í stjórnarsamgonguni í Athen, hevur skotið upp, at grikkar eiga at stovna ein almennan oljugrunn, eins og norðmenn gjørdu, og at grunnurin skal hava tær umleið 150 milliardir evrurnar, sum vinningurin av gassinum er mettur at verða tey næstu 30 árini. ?